## Janus aftur í HB

Tað hendu fleiri broytingar í HB, beint áðrenn flytingarvindeygað læt aftur í gjárkvøldið. Umframt Christian Høgna Jacobsen, so fóru eisini Pætur Jørgensen (AB) og Bárður Mittelstein og Svend F. Jacobsen (báðir TB) úr felagnum. Allir fýra við leigusáttmála. Hinvegin koma tveir spælarar nú aftur til felagið. Vagnur Mohr Mortensen skiftir aftur til HB, eftir at hann hevur spælt nakrar dystir við AB, og Janus M. Joensen kemur nú aftur. Liðskiparin, sum í fjør lyfti FM-steypið, hevur verið burturstaddur í ár, men í heyst verður hann so aftur at síggja í barndómsfelagnum.



## Útskifting í EB/Streymi

Hjá felagsliðnum í Sundalagnum er ein miðvallari komin til felagið, meðan annar miðvallarleikari hevur leitað sær í annað felag í landinum. Leikarin, sum er komin til felagið, er ikki ókendur í EB/Streymi. Talan er um Jákup Martin Joensen, sum kemur frá AB. Jákup Martin er eiðismaður og hevur í fleiri ár spælt við besta liðnum hjá EB/Streymi. EB/Streymur missir tó eisini ein leikara. Knút Vesturtún, sum hevur verið illa darvaður av skaðum í ár, hevur valt at leika restina av kappingarárinum við ÍF í næstbestu deildini.

# Nýtt AB skal stríðast

**Tað er ikki bara á venjarafrontinum, at skiftingin hevur verið stór í AB. Talan er nærum um kollvelt lið, sum fer út at stríðast í seinnu hálvu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá Sigfríður Clementsen varð settur í venjarasessin ístaðin fyri Frákoyrda Oddbjørn Joensen, vóru boðini úr AB-leiðsluni, at nakrar broytingar helst eisini fóru at verða í spælarahópinum.

Og talan er ikki um smávegis broytingar heldur. Venjaruppsøgnin skapti somikið stóra ónøgd hjá hjálparvenjaranum hjá Oddbirni, Súna Fríða Barbá, at hesin alt fyri eitt vildi sleppa burtur úr felagnum. Og nú er so eisini liðskiparin hjá fyrrverandi venjaranum, Jákup Martin Joensen, farin sama veg.

Hartil eru Hendrik og Tummas Hans Rubeksen eisini farnir úr felagnum. Og tað er í hesum sambandi eisini vert at bíta merki í, at Tummas Hans í síni tíð skifti úr B36 til AB, meðan Sigfríður var venjari hjá árstalsfelagnum.

Beint áðrenn flytingarvindeygað læt aftur, stóð eisini greitt, at Vagnur Mohr Mortensen aftur fer til HB. Hetta skal tó helst síggjast í ljósinum av, at Vagnur og fyrrverandi HB-venjarin, Krzsyztof Popczynski, ikki komu serliga væl um sátt, og at Vagnur tí nú metir seg hava betri møguleikar í HB, enn hann hevði undan venjaraskiftinum.

Hinvegin eru spælarar eisini komnir til AB. Allan Mørkøre og Evrard Ble eru báðir spælarar, sum hava evni at lyfta stríðsandan á liðnum, og ivaleyst hevur venjarin heilt stórt álit á júst hesum báðum. Á bakkplássinum hevur AB havt trupulleikar í ár, men við at fáa Pætur Jørgensen á hetta hevur felagið í øllum førum eitt gott kort afturat, tá tann kabalin skal leggjast.



*Dysturin móti VB/Sumba gjørdist tann seinasti, har Oddbjørn Joensen var venjari hjá AB. Hóast lagið á Súna Fríða Barbá her er gott, var hetta eisini byrjanin til endan av hansara tíðarskeiði í felagnum*

*savnsmynd*

# Jón Rói aftur á hægsta støði

**Nógv bendir á, at føroyski landsliðsspælarin nú verður roknaður millum teir fyrstu ellivu í AaB, sum í annaðkvøld setir sjøtil á nýggja kappingarárið**

ÚTISETAR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í annaðkvøld fer AaB undir nýggja kappingarárið í superliguni, tá FCK kemur á vitjan.

Í Aalborg siga teir seg hava gott mót. Í fjør vunnu teir tvær ferðir á FCK í Parkini í Keypmannahavn, og AaB vann fýra av teimum seinastu heimadystunum í vár.

Leygardagin var AaB í Belgia og spældi í Intertoto ímóti Gent. 1-1 varð mett at vera avbera gott úrslit ímóti fjórði besta liðnum í Belgia. Svenski AaB venjarin, Erik Hamrén, segði seg vera væl nøgdan við avrikið, eisini út frá fyritreytunum, sum vóru, at AaB í ein hálvan tíma var undirmannað.

### Stór útskifting

Síðsta kappingarár var føroyski leikluturin í AaB eyðkendur av nógvum skaðum. Jón Rói Jacobsen megnaði at koma fyri seg aftur eftir krossbandsskaða nummar tvey, men hann var plágaður av øðrum skaðum, og Súni Olsen var eisini fleiri ferðir uttanfyri orsaka av skaðum.

Tá ið AaB í Belgia síðsta leygardag legði síðstu hond á fyrireikingarnar, var Jón Rói Jacobsen á vøllinum alla tíðina. Súni Olsen varð skiftur inn, tá ið tað restaðu tólv minuttir.

Í summarsteðginum hevur AaB selt ein av miðvallarprofilunum, Rasmus Würtz, til júst FCK. Ein av spurningunum, sum tað í fótbóltsuimhvørvinum í Aalborg hevur verið tosað nógv um, er, hvør nú skal eiga verjukenda miðvallarplássið. Tríggir spælarar kappast um plássið. Súni Olsen er ein av teimum, men leygardagin var ein annar enn hann millum teir fyrstu ellivu, og tað er sannlíkt, at Súni eisini í annaðkvøld verður á beinkinum.

Hetta vil tó ikki siga, at Súni ikki fer at fáa dystarvenjing. Hann verður mettur at vera ógvuliga fjøltáttaður spælari. Fyrr í summar var sáttmálaskeiðið hjá honum longt, og um hann ikki fer at megna at vinna sær fast pláss á miðvøllinum, so eru møguleikar fyri, at hann fer at verða brúktur á bakkinum.

### Jón Rói stóran leiklut

Í donsku fjølmiðlunum verður roknað við, at Jón Rói Jacobsen í annaðkvøld verður annar av miðverjunum. Erik Hamrén segði eftir dystin í Belgia, at hann var væl nøgdur við avrikið – eisini í verjuni.

Umframt at vera stinnur og álitisfullur í miðverjuni, so hevur Jón Rói máltev. Tað vísti hann eisini í Belgia. Tá ið støðan var 1-1, og AaB var undirmannað, var um reppið, at Jón Rói við høvdinum skoraði sigursmálið. Men bólturin brast í tvørtræið.

Um Jón Rói í annaðkvøld verður millum teir fyrstu ellivu hjá AaB, so kunnu vit ikki siga annað, enn at 24 ára gamli havnarmaðurin við stríði og miðvísum arbeiði hevur megnað at vunnið seg aftur á tað støðið, sum hann var á, áðrenn hann sleit krossbandið í Brøndby og seinni í Aalborg.

Uppgerðin á Aalborg stadion verður klokkan 17 mikudagin, og møguleiki verður at fylgja við á TV3+.

## Lundberg til GÍ

**Vandamikli áleyparin, sum í fjør skeyt 12 mál í 14 Formula-dystum fyri KÍ í hálvt kappingarár, skal nú spæla við GÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast tað at enda stóð greitt, at samstarvið millum Christian Lundberg og Tony Paris ikki riggaði serliga væl, so stóð eisini greitt, at við dananunm hevði KÍ í fjør kanska vandamesta spælaran í føroyskum fótbólti.

Við 12 málum í 14 dystum var hann ein støðug hóttan móti øllum Formula-verjunum. Ikki minst GÍ, har Geza Turi fýra ferðir í tveimum dystum mátti ásanna, at Lundberg dugdi síni ting.

Og ivaleyst eru teir báðir dystirnir millum mest tungtvigandi orsøkirnar til, at GÍ nú hevur knýtt Lundberg at felagnum. Gøtumenn hava leingi leitað sær eftir styrki til álopið, men higar til hevur hetta verið mest sum úrslitaleyst. Hendrik Rubeksen er tó komin afturat, men er hann kanska ikki ein spælari, ið kann roknast sum berandi kraft á liðnum.

Tað kann Lundberg hinvegin. Royndarvenjing ella líknandi skuldi ikki verið aktuel hjá einum spælara, sum í so stóran mun hevur prógvað sítt virði, og so er spurningurin bara, um hann er maðurin, sum kann skjóta gøtumenn upp móti evropisku sessunum.